Medical Report 2024
From the Chief Medical Officer
in the Faroe Islands

# HEILSULÝSING LANDSLÆKNANS 2024

**Tittul:** Heilsulýsing Landslæknans 2024
Medical Report 2024 from the Chief Medical Officer in the Faroe Islands

**Útgevari:** Landslæknin, Tórshavn 2024
2. útgáva

Chief Medical Officer
Landslæknin

Tinghúsvegur 42
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
TLF: +298 660400
Teldupostur: foe@stps.dk
Heimasíða: www.landslaeknin.fo

**Starvsfólk**

Lars Fodgaard Møller, landslækni
Drós Dalsgarð, lækni
Jóhanna Ljósá Hansen, cand.scient.med.
Lona P. Johansen, skrivstovufulltrúi
Liljan Midjord, skrivari
Sara Elisa Joensen, skrivari

**Konsulentar**

Olga Kristina Hansen, lækni
Eyðbjørg Klemmentsen Gaard, lækni

# Heilsulýsing Landslæknans 2024

Tórshavn
September
2024

# Innihaldsyvirlit


**1. Landslæknaembætið** 8

1.1 Nevndir o.a. . . . . . . . 8

**2. Fólkatalið, fødd á lívi og deyð** 9

2.1 Deyð hvønn mánað - ávikavist menn og kvinnur . . . . . . . 9

**3. Føðingarhagtøl** 10

3.1 Burðaravlop . . . . . . . 10

3.2 Fødd á lívi . . . . . . . 10

3.3 Tal á føddum børnum eftir móðuraldri o.ø. fyri 2023 og 2022 . . . . . . . 12

3.4 Tal á føðingum hjá mammum undir 20 ár, skift á øki fyri 2023 og 2022 . . . . . . . 12

3.5 Føðingar, eftir hvussu gamal pápin var, tá ið barnið varð føtt, í 2023 og 2022 . . . 13

3.6 Deyðfødd børn og tíðleiki av deyðføddum . . . . . . . 13

3.7 Føðingar áður – deyðføðingar, spontanir abortar og fosturtøkur, hjá kvinnunum í áttu . . . . . . . 14

3.8 Burðarvekt, skift á øki í 2023 og 2022 . . . . . . . 14

3.9 Vekt og longd hjá børnum, født á lívi . . . . . . . 15

3.10 Talið á roykjarum í % við fyrstu barnakonukanning . . . . . . . 16

3.11 Burðarvekt í mun til um mamman roykir ella ikki roykir . . . . . . . 16

3.12 Tvíburar sum vórðu føddir í 2023 og 2022 . . . . . . . 16

3.13 Apgarscore . . . . . . . 17

3.14 Fødd innan- og uttan hjúnalags . . . . . . . 19

3.15 Sambúgvandi við fyrstu barnakonukanning 2018 – 2023 . . . . . . . 20

3.16 Føðingar á sjúkrahúsum . . . . . . . 21

3.17 Føðingar við keisaraskurði 2018 – 2023 . . . . . . . 21

3.18 Keisaraskurðir á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar Sjúkrahúsi 2014 – 2023 . . . 22

3.19 Tal á livandi føddum, skift á øki og móðuraldur, tá ið hon eigur, í 2023 og 2022 . . 22

3.20 Viðgongutíð . . . 23

3.21 Stakføðd, føðd á lívi, viðgongutíð og burðarvekt í 2023 og 2022 . . . 24

3.22 Øll børn føðd á lívi, eftir burðarvekt, 2018 – 2023 . . . 24

3.23 Børn føðd 2018 – 2023, skift á øki (roknað uppí eru børn, sum eru føðd í Føroyum, men mamman búði uttanlands) . . . 25

3.24 Vøggudeyði (SIDS) í tiðarskeiðinum frá 1960 til 2023 . . . 25

**4. Fosturtøkur (abortus provocatus) 26**

4.1 Tal á fosturtøkum í Føroyum 2014 – 2023, eftir aldri á kvinnunum . . . 26

**5. Stervingar (sterilisatiónir) 27**

5.1 Fundir í Stervingarnevndini (Sterilisatiónsnevndini) . . . 27

5.2 Tølini fyri játtaðar umsóknir . . . 27

**6. Deyðleiki 28**

6.1 Tal á føroyingum, deyðir í 2023 og 2022 . . . 28

6.2 Pinkubarnadeyði . . . 28

6.3 Deyðføðd . . . 28

6.4 Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan og frá 65 ára aldri, 2013 – 2023 . . . 28

6.5 Lívsævin hjá nýføðingum í Føroyum í miðal fyri árini 2013 – 2023 . . . 29

6.6 Deyðaatvold hjá føroyingum 2013 – 2022 . . . 29

**7. Rættarlæknaligt virksemi 32**

7.1 Rættarlæknaligar líkskoðanir . . . 32

7.2 Vanlukkutilburðir . . . 32

7.3 Omandøttur og fall . . . 32

7.4 Drukning . . . 32

7.5 Kvaling . . . 32

7.6 Eitran . . . 33

7.7 Arbeiðsvannlukkur . . . 33

7.8 Sjálvmorð . . . 33

7.9 Dráp ... 34
7.10 Náttúrligur deyði ... 34
7.11 Rættarlæknaligir líkskurðir ... 34
7.12 Líkpass ... 34

**8. Smittandi sjúkur, farsóttir o.a. 35**

8.1 Syfilis og gonorré ... 35
8.2 Klamydia ... 36
8.3 HIV og eyðkvæmi (AIDS) ... 37
8.4 Hepatitis ... 37
8.5 Meningitis ... 37
8.6 Nátasjúka (ornithosis) ... 37
8.7 Kikhosti ... 37
8.8 Fárasjúka ... 38
8.9 HUS (hæmolytisk-uræmisk syndrom) ... 38
8.10 Legionella ... 38
8.11 Campylobacter ... 38
8.12 VTEC/STEC ... 38
8.13 Salmonella ... 38
8.14 MRSA ... 38
8.15 Tuberklar ... 38
8.16 Barnakoppsetingarskráin ... 39

**9. Virksemi viðvíkjandi umhvørvi 43**

9.1 Kirkjugarðar ... 43
9.2 Mál um at umhvørvisgóðkenna virki ... 43

10. **Eftirlit við heilsuverkinum** 44

10.1 Heilsufaklig eftirlit . . . 44
10.1.1. Skráseting . . . 44
10.1.2. Gjald . . . 45
10.1.3. Eftirlitsfrágreiðingar . . . 45

10.2 Eftirlit við heilsustarvsfólki . . . 45

10.3 Eftirlit við viðgerðarfyriskipanum . . . 45

10.4 Førleikaeftirlit . . . 45

10.5 Mál viðvíkjandi løggildum heilsustarvsfólki við 75 ára aldur . . . 45

10.6 Sjúkrahússtarvsfólk í 2013 – 2022 . . . 46

10.7 Sett kommunulæknastørv og tannlæknastørv pr. 31.10.2023 . . . 46

10.8 Kærur um løggild heilsustarvsfólk . . . 47

11. **Apoteksverkið** 48

11.1 Apotek, handkeypssølur og starvsfólk . . . 48

11.2 Skrásetingarnevndin . . . 48

11.3 Útflýggingarloyvi . . . 48

12. **Annað virksemi** 49

12.1 Mál viðvíkjandi koyrikorti . . . 49

12.2 Metingar av heilsustøðu . . . 49

12.3 Gitnaðarmál . . . 49

12.4 Verjumál . . . 49

13. **Fólkaheilsa** 50

13.1 Yvirvekt . . . 50

13.2 Roykjarar . . . 52

13.3 Rúsdrekka . . . 53

14. **Aðrar frágreiðingar** 54

14.1 Alkohol på Færøerne – forbrug, lovgivning og debat 2023 . . . 54

14.2 Forbruget af Ozempic, Wegovy, Rybelsus, Saxenda og Victoza på Færøerne . . 54

# 1. Landslæknaembætið

Landslæknaembætið er stovnur undir Indenrigs- og Sundhedsministeriet í Danmark og var fram til oktober 2015 fakliga knýttur at Sundhedsstyrelsen, t.e. danska heilsustýrinum, og eftir tað at Styrelsen for Patientsikkerhed.

Umframt landslæknan eru at stovninum knýttur ein lækni í útbúgvingarstarvi, trý skrivstovufólk og ein cand.scient med.

Landslæknin ráðgevur Føroya Landsstýri og kommunalum myndugleikum í læknaligum, heilsufrøðiligum, umhvørvisligum og sosialmedisinskum viðurskiftum.

Landslæknin hevur eftirlit við tí heilsufakliga virksemi, ið lóggild heilsustarvsfólk (læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, fysioterapeutar o.o.) útinna í Føroyum.

Landslæknin veitir stuðul til rættar- og løgreglumyndugleikar í rættarlæknaligum og líknandi málum. Landslæknin ger tilmæli til Akstovuna í koyrikortmálum.

Umframt omanfyri nevnda virksemið hevur Landslæknaembætið fleiri aðrar uppgávur í Føroyum, sum Heilsustýrið í Danmark og Styrelsen for Patientsikkerhed ikki hava. Nevnast kunnu hesar uppgávur:

- At meta heilsuváttanir í sambandi við tænastumannastørv. Hesa uppgávu hevur ”Nævnet for helbredsbedømmelse i tjenestemandssager” í Danmark.
- Tilmæli til Landsstýrið viðv. lógum, kunngerðum, leiðbeiningum o.ø. við atliti til heilsufakliga leiðbeining.
- At viðgera mál um nýtslu av heilivági, ið ikki er skrásettur.
- Hagtalsarbeiði í sambandi við deyðsváttanir og føðingarfráboðanir. Í Danmark ger Sundhedsdatastyrelsen hetta arbeiðið.
- Lýsa kærumál fyri Styrelsen for Patientklager.

## 1.1 Nevndir o.a.

Landslæknin er m.a. limur í Stervingarnevndini fyri Føroyar, Farsóttarnevndini, Koppsetingarbólkinum, Skrásetingarnevndini fyri farmaceutiskar serú búnaðir, Føroyska Pandemibólkinum og Tilbúgvingarráði Føroya.

# 2. Fólkatalið, føðd á lívi og deyð

Sambært Hagstovu Føroya var fólkatalið hin 1. januar 2023 **54.074**. 1. januar 2024 var fólkatalið **54.452**.

| Fólkatalið, skift á kyn og aldur pr. 1. januar 2024 | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Aldur** | **00-09** | **10-19** | **20-29** | **30-39** | **40-49** | **50-59** | **60-69** | **70-79** | **80-89** | **90-99** | **100+** | **Tilsamans** |
| **Menn** | 3752 | 3816 | 3293 | 3801 | 3556 | 3624 | 3007 | 2329 | 992 | 164 | 0 | 28334 |
| **Kvinnur** | 3594 | 3599 | 2617 | 3381 | 3086 | 3196 | 2917 | 2243 | 1159 | 319 | 7 | 26118 |
| **M+K** | **7346** | **7415** | **5910** | **7182** | **6642** | **6820** | **5924** | **4572** | **2151** | **483** | **7** | **54452** |

Kelda: Hagstova Føroya

Sambært fráboðanum frá ljósmøðrum og prestum vóru tølini á livandi føddum og deyðum hesi:

| År | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Fødd á lívi** | 573 | 629 |
| **Deyð** | 406 | 479 |

Keldur: Føðifráboðanir og deyðsattestir frá ljósmøðrunum á teimum føroysku sjúkrahúsunum, Landslæknin og sóknarprestarnir

## 2.1 Deyð hvønn mánað - ávikavist menn og kvinnur

| | 2023 | | | 2022 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Menn** | **Kvinnur** | **Tilsamans** | **Menn** | **Kvinnur** | **Tilsamans** |
| **Januar** | 22 | 19 | 41 | 26 | 14 | 40 |
| **Februar** | 22 | 18 | 40 | 24 | 22 | 46 |
| **Mars** | 12 | 9 | 21 | 27 | 28 | 55 |
| **Apríl** | 20 | 16 | 36 | 14 | 23 | 37 |
| **Mai** | 17 | 20 | 37 | 28 | 19 | 47 |
| **Juni** | 15 | 18 | 33 | 21 | 12 | 33 |
| **Juli** | 16 | 13 | 29 | 20 | 28 | 48 |
| **August** | 23 | 12 | 35 | 24 | 18 | 42 |
| **September** | 18 | 16 | 34 | 16 | 12 | 28 |
| **Oktober** | 10 | 24 | 34 | 21 | 9 | 30 |
| **November** | 11 | 18 | 29 | 14 | 21 | 35 |
| **Desember** | 17 | 20 | 37 | 25 | 13 | 38 |
| **Alt árið** | **203** | **203** | **406** | **260** | **219** | **479** |



LANDSLÆKNIN
STYRELSEN FOR PATIENTSIKKERHED

# 3. Føðingarhagtøl

*Keldur: Landslæknin ger føðingarhagtølini út frá føðifráboðanum frá ljósmøðrunum á teimum føroysku sjúkrahúsunum og fráboðanum frá sóknarprestunum.*

Føðingarfráboðaninar vísa, at ljósmøður í 2023 vóru um 569 føðandi kvinnur, ið føddu 574 børn, og av hesum vóru 573 fødd á lívi. Av teimum vóru fimm tvíburar.

Í 2022 vóru ljósmøður um 621 føðandi kvinnur, ið føddu 634 børn, og av hesum vóru 629 fødd á lívi. Av teimum vóru 13 tvíburar.

## 3.1 Burðaravlop

Burðaravlopið (fødd á lívi minus deyð) var 167 í 2023 (150 í 2022).

Gongdin seinnu árini hevur verið henda:

| Ár | Tal |
|---|---|
| 2023 | 167 |
| 2022 | 150 |
| 2021 | 257 |
| 2020 | 274 |
| 2019 | 274 |
| 2018 | 288 |
| 2017 | 207 |
| 2016 | 306 |
| 2015 | 227 |
| 2014 | 265 |

## 3.2 Fødd á lívi

Sambært føðingarfráboðanum og fráboðanum frá prestum vóru fødd 573 livandi børn í 2023, 311 dreingir og 262 gentur. 10 av hesum børnum vórðu fødd á Ríkissjúkrahúsinum. Seks mammur at hesum børnum búðu uttan fyri Føroyar.

Í 2022 vóru fødd 629 livandi børn, 319 dreingir og 310 gentur. Seks av hesum børnum vórðu fødd á Ríkissjúkrahúsinum og eitt barn á Århus Universitetshospitali í Danmark. Fimm mammur at hesum børnum búðu uttan fyri Føroyar.

Talið á børnum føddum á lívi hevur seinnu árini verið hetta:

| Ár | Tal á børnum, fødd á lívi |
|---|---|
| 2023 | 573 |
| 2022 | 629 |
| 2021 | 682 |
| 2020 | 678 |
| 2019 | 678 |
| 2018 | 681 |
| 2017 | 652 |
| 2016 | 686 |
| 2015 | 607 |
| 2014 | 653 |

Miðaltalið á børnum fødd á lívi nøkur 5-ára tíðarskeið:

| Ár | Børn fødd á lívi í miðal |
|---|---|
| 2023 – 2019 | 648 |
| 2018 – 2014 | 656 |
| 2013 – 2009 | 622 |
| 2008 – 2004 | 696 |
| 2003 – 1999 | 677 |
| 1998 – 1994 | 665 |

## 3.3 Tal á føddum børnum eftir móðuraldri o.ø. fyri 2023 og 2022

Í talvuni niðanfyri sæst, at miðalaldurin á føroyskum kvinnum, ið áttu fyrstu ferð, var 28,4 ár í 2023 (27,9 í 2022). Til samberingar kann nevnast, at í Danmark var miðalaldurin á kvinnum, ið áttu fyrstu ferð í 2023 og 2022 ávikavist 30,0 og 29,9.

| | 2023 | | | 2022 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal á føðingum | % av øllum føðingum | Miðalaldur á mammum | Tal á føðingum | % av øllum føðingum | Miðalaldur á mammum |
| **Átt 1. ferð** | 177 | 31,1 | 28,4 | 172 | 27,7 | 27,9 |
| **Átt 2. ferð** | 182 | 32,0 | 31,1 | 208 | 33,5 | 30,6 |
| **Átt 3. ferð** | 140 | 24,6 | 33,7 | 171 | 27,5 | 32,9 |
| **Átt 4. ferð** | 46 | 8,1 | 35,3 | 45 | 7,2 | 34,6 |
| **Átt 5.+ ferð** | 14 | 2,5 | 35,3 | 17 | 2,7 | 37,9 |
| **Ikki upplýst** | 10 | 1,8 | 30,6 | 8 | 1,3 | 34,9 |
| **Tilsamans** | **569** | **100** | **31,3** | **621** | **100** | **31,0** |

## 3.4 Tal á føðingum hjá mammum undir 20 ár, skift á øki fyri 2023 og 2022

Í 2023 áttu mammur, sum vóru millum 16 og 19 ár, sjey av børnunum. Tvær av teimum ungu mammunum búðu í Tórshavn, tvær í Norðoyggjum, tvær í Suðuroy og ein í Eysturoynni.

Í 2022 áttu mammur, sum vóru millum 17 og 19 ár, fimm av børnunum. Tvær av teimum ungu mammunum búðu í Tórshavn, ein í Norðurstreymoy, ein í Eysturoynni og ein í Suðuroynni.

Tal á børnum í 2023 og 2022 – sum mammur undir 20 ár áttu, skift á øki:



## 3.5 Føðingar, eftir hvussu gamal pápin var, tá ið barnið varð føtt, í 2023 og 2022

| | < 17 | 17-19 | 20-24 | 25-29 | 30-34 | 35-39 | 40-44 | ≥ 45 | Ikki upplýst | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2023** | 0 | 4 | 30 | 102 | 197 | 140 | 55 | 29 | 12 | 569 |
| **2022** | 0 | 1 | 34 | 136 | 197 | 148 | 58 | 40 | 7 | 621 |

Miðalaldurin á pápum hjá nýføðingum var 34,1 í 2023 og 34,2 í 2022.

Til samanberingar kann nevnast, at í Danmark var miðalaldurin 33,6 í 2023 og 33,5 í 2022.

## 3.6 Deyðfødd børn og tíðleiki av deyðføddum

Talið á deyðføddum í 2023 var eitt. Við tølunum: 573 fødd á lívi og einum deyðføddum er tíðleikin av deyðføddum í 2023 1,7 ‰.

Talið á deyðføddum í 2022 var fimm. Við tølunum: 629 fødd á lívi og fimm deyðføddum er tíðleikin av deyðføddum í 2022 7,9 ‰.

Tíðleikin av deyðføddum í Føroyum hevur seinnu árini verið:

| Ár | ‰ |
|---|---|
| 2023 | 1,7 |
| 2022 | 7,9 |
| 2021 | 1,5 |
| 2020 | 2,9 |
| 2019 | 4,4 |
| 2018 | 1,5 |
| 2017 | 1,5 |
| 2016 | 2,9 |
| 2015 | 4,9 |
| 2014 | 0,0 |

## 3.7 Føðingar áður – deyðføðingar, spontanir abortar og fosturtøkur, hjá kvinnunum í áttu

Tær 569 kvinnurnar, ið áttu í 2023 høvdu samanlagt áður átt eitt deyðføtt barn, áður havt 235 spontanar abortar og 44 fosturtøkur. Tær 621 kvinnurnar, ið áttu í 2022 høvdu samanlagt áður átt átta deyðfødd børn, áður havt 227 spontanar abortar og 28 fosturtøkur.

| | Føðandi kvinnur | Deyðføðingar áður | Spontanir abortar áður | Fosturtøkur áður |
|---|---|---|---|---|
| **2023** | 569 | 1 | 235 | 44 |
| **2022** | 621 | 8 | 227 | 28 |
| **2021** | 677 | 3 | 246 | 30 |
| **2020** | 670 | 5 | 217 | 31 |

## 3.8 Burðarvekt, skift á øki í 2023 og 2022

Í 2023 vigaðu nýføðingar úr Suðuroynni mest í miðal (3889 g), og nýføðingar úr Eysturoynni vigaðu minst í miðal (3558 g). Í 2022 vigaðu nýføðingar úr Vágoynni mest í miðal (3899 g), og børn úr Streymoynni uttanfyri Tórshavn vigaðu minst í miðal (3582 g).

Miðal føðivekt fyri øll børn í 2023 og 2022 skift á øki sæst í talvuni niðanfyri:

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Thn. Hoyv. Arg.** | 3703 g | 3634 g |
| **Streymoy - Thn.** | 3641 g | 3582 g |
| **Eysturoy** | 3558 g | 3618 g |
| **Vágoy** | 3572 g | 3899 g |
| **Norðoyggjar** | 3639 g | 3689 g |
| **Sandoy** | 3754 g | 3603 g |
| **Suðuroy** | 3889 g | 3838 g |

Miðal føðivekt fyri stakfødd børn í 2023 og 2022 skift á øki sæst í talvuni niðanfyri:

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Thn. Hoyv. Arg.** | 3703 g | 3689 g |
| **Streymoy - Thn.** | 3641 g | 3592 g |
| **Eysturoy** | 3642 g | 3670 g |
| **Vágoy** | 3572 g | 3899 g |
| **Norðoyggjar** | 3639 g | 3701 g |
| **Sandoy** | 3754 g | 3603 g |
| **Suðuroy** | 3889 g | 3838 g |

## 3.9 Vekt og longd hjá børnum, fødd á lívi

Hægsta burðarvekt í 2023 var 5380 g (ein drongur). Lægsta burðarvekt í 2023 var 340 g (ein drongur). Í 2022 vóru tølini ávikavist 5680 g (ein drongur) og 1605 g (ein genta).

Tølini hava síðani 2014 verið hesi:




Longstu nýføðingarnir í 2023 vóru 58 cm langir (tríggir dreingir). Stytsti nýføðingurin í 2023 var 28 cm langur (ein drongur). Í 2022 vóru tølini ávikavist 59 cm (ein drongur og ein genta) og 31 cm (ein drongur). Tølini hava síðani 2014 verið hesi:



## 3.10 Talið á roykjarum í % við fyrstu barnakonukanning

Sambært fráboðanum frá ljósmøðrum roykti 40 av 569 barnakonum í 2023, tá ið tær vóru til fyrstu barnakonukanning (7,0%). Í 2022 royktu 44 av 621 barnakonum, tá ið tær vóru til fyrstu barnakonukanning (7,1%). 15 (2,6%) av mammunum í 2023 hava ikki upplýst, hvørt tær royktu ella ikki. Í 2022 var talið átta (1,3%).

## 3.11 Burðarvekt í mun til um mamman roykir ella ikki roykir

Miðalburðarvektin í 2023 hjá børnum har mamman roykti, tá hon var til fyrstu barnakonukanning, var 3543 g. Hjá teimum, ið ikki royktu, var miðalburðarvektin 3664 g. Í 2022 vóru tølini ávikavist 3577 g og 3689 g. Tað vil siga, at børn hjá mammum, ið royktu, vigaðu í 2023 í miðal 121 g (3,3%) minni enn børn hjá mammum, ið ikki royktu. Í 2022 var munurin 112 g (3,0%).

Miðalburðarvekt (g) í 2023 og 2022 í mun til um mamman roykir ella ikki roykir:




## 3.12 Tvíburar sum vórðu føddir í 2023 og 2022

Í 2023 vóru fimm tvíburar føddir, allir á Landssjúkrahúsinum og allir vóru føddir á lívi. Miðalaldurin á mammunum í 2023 var 33,3. Av hesum fimm tvíburunum vóru trý pør fødd til tíðina, eitt í viku 36 og eitt í viku 30.

Tvey av børnunum vigaði undir 2000 g, sjey vigaðu millum 2100 og 3000 g og eitt yvir 3000 g. Í miðal vigaðu børnini 2441 g.

Í 2022 vóru trettan tvíburar føddir, allir á Landssjúkrahúsinum og allir vóru føddir á lívi. Miðalaldurin á mammunum í 2022 var 30,7. Av hesum trettan tvíburunum vóru sjey pør fødd til tíðina, fýra í viku 36 og tvey í viku 35.

Eitt av børnunum vigaði undir 2000 g, 17 vigaðu millum 2100 og 3000 g og sjey yvir 3000 g. Eitt barn varð ikki vigað. Í miðal vigaðu børnini 2735 g.

## 3.13 Apgarscore

Apcarscore er eitt samanlagt tal, tá ið mett verður um støðuna hjá barninum, beint eftir at tað er føtt. Mett verður um fimm ymisk viðurskifti, og millum 0 og 2 stig verða givin. Tey fimm økini, ið mett verða, eru: andadráttur, húðarlitur, hjartasláttur, viðbrøgd (refleksir) og vøddaspenningar, sum tilsamans kunnu geva upp í 10 stig. Apgarscore verður mett eftir 1. og 5. minutti.

Apcarscore í miðal í 2023 í 1. og 5. minutti, skift á viðgongutíð, føðingarhátt og eftir um mamman roykir ella ikki roykir:



Apcarscore í miðal í 2022 í 1. og 5. minutti, skift á viðgongutíð, føðingarhátt og eftir um mamman roykir ella ikki roykir:



## 3.14 Fødd innan- og uttan hjúnalags

264 børn (46,0%) vóru fødd innan hjúnalags meðan 303 (52,8%) vóru fødd uttan hjúnalags í 2023. Í 2022 vóru 283 børn (44,6%) fødd innan hjúnalags og 346 (54,4%) fødd uttan hjúnalags.




Hesi tøl í % hava seinnu árini verið:

| Ár | Innan hjúnalags | Uttan hjúnalags | Ikki upplýst |
|---|---|---|---|
| 2023 | 46,0 | 52,8 | 1,2 |
| 2022 | 44,6 | 54,4 | 0,9 |
| 2021 | 41,3 | 58,5 | 0,2 |
| 2020 | 43,9 | 55,7 | 0,4 |
| 2019 | 39,1 | 60,2 | 0,7 |
| 2018 | 44,1 | 55,5 | 0,4 |
| 2017 | 44,9 | 54,6 | 0,5 |
| 2016 | 46,2 | 53,7 | 0,1 |
| 2015 | 44,3 | 55,7 | 0,0 |
| 2014 | 43,5 | 56,5 | 0,0 |

## 3.15 Sambúgvandi við fyrstu barnakonukanning 2018 – 2023

Í 2023 hava 528 mammur (92,8%), sum áttu, sagt, at tær búgva saman við pápanum. 30 (5,3%) mammur búðu ikki saman við pápanum. Í 2022 hava 585 mammur, sum áttu, sagt, at tær búgva saman við pápanum. 29 mammur búðu ikki saman við pápanum.




Hesi tøl í % hava seinnu árini verið:

| | 2023 | | 2022 | | 2021 | | 2020 | | 2019 | | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** |
| **Mamman býr saman við pápanum** | 528 | 92,8 | 585 | 94,2 | 632 | 93,4 | 631 | 94,2 | 625 | 92,1 | 639 | 93,7 |
| **Mamman býr ikki saman við pápanum** | 30 | 5,3 | 29 | 4,7 | 42 | 6,2 | 36 | 5,4 | 51 | 7,5 | 38 | 5,6 |
| **Ikki upplýst** | 11 | 1,9 | 7 | 1,1 | 3 | 0,4 | 3 | 0,4 | 3 | 0,4 | 5 | 0,7 |
| **Tilsamans** | **569** | **100** | **621** | **100** | **677** | **100** | **670** | **100** | **679** | **100** | **682** | **100** |

## 3.16 Føðingar á sjúkrahúsum

569 t.e. 99,1% av øllum føðingum fóru fram á sjúkrahúsum í 2023. Fýra kvinnur áttu heima og ein í sjúkrabili.

628 t.e. 99,1% av øllum føðingum fóru fram á sjúkrahúsum í 2022. Seks kvinnur áttu heima.

Hesi tøl í % hava seinnu árini verið:

| Ár | % |
|---|---|
| 2023 | 99,1 |
| 2022 | 99,1 |
| 2021 | 99,3 |
| 2020 | 98,7 |
| 2019 | 99,6 |
| 2018 | 99,6 |
| 2017 | 98,8 |
| 2016 | 99,6 |
| 2015 | 99,7 |
| 2014 | 99,7 |

## 3.17 Føðingar við keisaraskurði 2018 – 2023

Sambært føðifráboðanum frá ljósmøðrunum áttu 101 kvinnur við keisaraskurði í 2023, og 463 áttu gjøgnum móðurskeiðina (vaginalt). Í 2022 vóru tølini ávikavist 104 og 522.

| | 2023 | | 2022 | | 2021 | | 2020 | | 2019 | | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** |
| **Børn, fødd við keisaraskurði** | 101 | 17,9 | 104 | 16,4 | 121 | 17,9 | 102 | 15,2 | 117 | 17,2 | 87 | 12,9 |
| **Børn, fødd gjøgnum móðurskeiðina (vaginalt)** | 463 | 80,5 | 522 | 82,3 | 553 | 81,7 | 564 | 84,2 | 559 | 82,3 | 585 | 87,1 |
| **Ikki upplýst** | 10 | 1,6 | 8 | 1,3 | 3 | 0,4 | 4 | 0,6 | 3 | 0,5 | 0 | 0,0 |
| **Tilsamans** | **574** | **100** | **634** | **100** | **677** | **100** | **670** | **100** | **679** | **100** | **672** | **100** |

## 3.18 Keisaraskurðir á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar Sjúkrahúsi 2014 – 2023

| | Landssjúkrahúsið | | | Suðuroyar Sjúkrahús | | | Tilsamans | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Føðingar | Keisara-skurðir | % | Føðingar | Keisara-skurðir | % | Føðingar | Keisara-skurðir | % |
| **2023** | 558 | 101 | 18,1 | 0 | 0 | 0,0 | 558 | 101 | 18,1 |
| **2022** | 619 | 104 | 16,8 | 1 | 0 | 0,0 | 620 | 104 | 16,8 |
| **2021** | 667 | 121 | 18,1 | 3 | 0 | 0,0 | 670 | 121 | 18,1 |
| **2020** | 656 | 101 | 15,4 | 1 | 0 | 0,0 | 656 | 101 | 15,4 |
| **2019** | 668 | 116 | 17,4 | 3 | 1 | 33,3 | 671 | 117 | 17,4 |
| **2018** | 668 | 87 | 13,0 | 1 | 0 | 0,0 | 669 | 87 | 13,0 |
| **2017** | 630 | 113 | 17,9 | 1 | 1 | 100 | 631 | 114 | 18,1 |
| **2016** | 669 | 116 | 17,3 | 5 | 1 | 20,0 | 674 | 117 | 17,4 |
| **2015** | 588 | 120 | 20,4 | 13 | 2 | 15,4 | 601 | 122 | 20,3 |
| **2014** | 617 | 131 | 21,2 | 26 | 1 | 3,8 | 643 | 132 | 20,5 |

Kvinnur, búsitandi í Suðuroy, áttu í 2023 40 børn (42 í 2022) (sí stk. 3.19). Sum talvan vísir, var eingin føðing á Suðuroyar Sjúkrahúsi í 2023. Ein í 2022. Síðani 2016 eru allar føðingar miðsavnaðar á Landssjúkrahúsinum.

## 3.19 Tal á livandi føddum, skift á øki og móðuraldur, tá ið hon eigur, í 2023 og 2022

| | 2023 | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Aldur (ár)** | **<17** | **17-19** | **20-24** | **25-29** | **30-34** | **35-39** | **40-44** | **>45** | **Ikki upplýst** | **Tils.** |
| **Tórshavnarøkið** | 0 | 2 | 22 | 40 | 84 | 47 | 12 | 1 | 3 | 211 |
| **Streymoy – Havnin ikki roknað uppí** | 0 | 0 | 4 | 19 | 24 | 8 | 4 | 0 | 0 | 59 |
| **Vágoy og Mykines** | 0 | 1 | 18 | 48 | 46 | 29 | 4 | 0 | 1 | 147 |
| **Eysturoy** | 0 | 0 | 7 | 10 | 10 | 7 | 2 | 1 | 0 | 37 |
| **Norðoyggjar** | 0 | 2 | 9 | 17 | 23 | 10 | 1 | 0 | 0 | 62 |
| **Sandoy** | 0 | 0 | 0 | 5 | 4 | 1 | 1 | 0 | 0 | 11 |
| **Suðuroy** | 1 | 1 | 3 | 11 | 10 | 11 | 3 | 0 | 0 | 40 |
| **Bústað uttan fyri Føroyar** | 0 | 0 | 3 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 6 |
| **Tilsamans fyri Føroyar** | **1** | **6** | **66** | **152** | **202** | **113** | **27** | **2** | **4** | **573** |

| | 2022 | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aldur (ár) | <17 | 17-19 | 20-24 | 25-29 | 30-34 | 35-39 | 40-44 | >45 | Ikki upplýst | Tils. |
| Tórshavnarøkið | 0 | 2 | 21 | 73 | 110 | 42 | 11 | 1 | 0 | 260 |
| Streymoy – Havnin ikki roknað uppí | 0 | 1 | 9 | 17 | 11 | 4 | 2 | 0 | 0 | 44 |
| Vágoy og Mykines | 0 | 0 | 5 | 6 | 10 | 17 | 1 | 0 | 0 | 39 |
| Eysturoy | 0 | 1 | 16 | 53 | 58 | 19 | 5 | 1 | 3 | 156 |
| Norðoyggjar | 0 | 0 | 12 | 23 | 28 | 8 | 2 | 0 | 0 | 73 |
| Sandoy | 0 | 0 | 1 | 5 | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 | 10 |
| Suðuroy | 0 | 1 | 7 | 10 | 12 | 8 | 4 | 0 | 0 | 42 |
| Bústað uttan fyri Føroyar | 0 | 0 | 2 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5 |
| **Tilsamans fyri Føroyar** | **0** | **5** | **73** | **189** | **231** | **100** | **26** | **2** | **3** | **629** |

## 3.20 Viðgongutíð

502 av teimum 573 børnunum (87,6%), ið vóru fødd á lívi í 2023, vórðu fødd rættstundis, t.e. í viku 37 – 41. Í 2022 vóru 550 (87,4%) av teimum børnunum, ið vóru fødd á lívi, fødd rættstundis.

4,5% av børnunum í 2023 vórðu fødd ov tíðliga, t.e. fyri 37. viku, og 6,1% av børnunum vórðu fødd í 42. viku ella seinni. Í 2022 vóru 4,7% av teimum børnunum, ið vóru fødd á lívi, fødd ov tíðliga, og 6,8% vórðu fødd í viku 42 ella seinni.

Í talvuni niðanfyri síggjast tølini á nýføðingum eftir viðgongutíð.

| Viðgongutíð fyri børn fødd á lívi, 2014 - 2023 (vikur) | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vikur | <32 | | 32-36 | | 37-41 | | 42 | | Ikki upplýst | | Tilsamans | |
| Ár | Tal | % | Tal | % | Tal | % | Tal | % | Tal | % | Tal | % |
| 2023 | 6 | 1,0 | 20 | 3,5 | 502 | 87,6 | 35 | 6,1 | 10 | 1,7 | 573 | 100 |
| 2022 | 1 | 0,2 | 28 | 4,5 | 550 | 87,4 | 43 | 6,8 | 7 | 1,1 | 629 | 100 |
| 2021 | 3 | 0,4 | 24 | 3,5 | 596 | 87,4 | 49 | 7,2 | 10 | 1,5 | 682 | 100 |
| 2020 | 4 | 0,6 | 21 | 3,1 | 577 | 85,1 | 71 | 10,5 | 5 | 0,7 | 678 | 100 |
| 2019 | 2 | 0,3 | 22 | 3,3 | 567 | 83,6 | 83 | 12,2 | 4 | 0,6 | 678 | 100 |
| 2018 | 0 | 0,0 | 19 | 2,8 | 612 | 90,3 | 44 | 6,5 | 3 | 0,4 | 678 | 100 |
| 2017 | 3 | 0,5 | 29 | 4,4 | 571 | 87,6 | 47 | 7,2 | 2 | 0,3 | 652 | 100 |
| 2016 | 2 | 0,3 | 31 | 4,5 | 607 | 88,5 | 34 | 5,0 | 12 | 1,7 | 686 | 100 |
| 2015 | 1 | 0,2 | 26 | 4,3 | 538 | 88,6 | 38 | 6,3 | 4 | 0,7 | 607 | 100 |
| 2014 | 5 | 0,8 | 18 | 2,8 | 579 | 88,7 | 7 | 0,1 | 4 | 0,3 | 653 | 100 |

## 3.21 Stakfødd, fødd á lívi, viðgongutíð og burðarvekt í 2023 og 2022

22 av stakføddu, livandi børnunum vóru fødd ov tíðliga, t.e. fyri 37. viku í 2023 (17 í 2022). Tvíburaføðingar eru ikki íroknaðar. Lagt kann verða afturat, at miðal burðarvektin fyri føroysk børn, ið vóru fødd í ella eftir 42. viku í 2023, var 4007 g (4035 g í 2022).

## 3.22 Øll børn fødd á lívi, eftir burðarvekt, 2018 – 2023

| Ár | 2023 | | 2022 | | 2021 | | 2020 | | 2019 | | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vekt** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** |
| **Niðanfyri 2500 g** | | | | | | | | | | | | |
| < 1 kg | 1 | 0,2 | 0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 2 | 0,3 | 1 | 0,1 | 0 | 0,0 |
| 1000-1499 | 4 | 0,7 | 0 | 0,0 | 2 | 0,3 | 1 | 0,1 | 0 | 0,0 | 0 | 0,0 |
| 1500-1999 | 2 | 0,3 | 6 | 1,0 | 3 | 0,4 | 2 | 0,3 | 3 | 0,4 | 3 | 0,4 |
| 2000-2499 | 11 | 1,9 | 15 | 2,4 | 12 | 1,8 | 13 | 1,9 | 11 | 1,6 | 7 | 1,0 |
| **Tils. niðanfyri 2500 g** | **18** | **3,1** | **21** | **3,3** | **17** | **2,5** | **18** | **2,6** | **15** | **2,2** | **10** | **1,5** |
| **2500+** | | | | | | | | | | | | |
| 2500-2999 | 44 | 7,7 | 50 | 7,9 | 42 | 6,1 | 40 | 5,9 | 40 | 5,9 | 45 | 6,6 |
| 3000-3499 | 139 | 24,3 | 143 | 22,7 | 148 | 21,7 | 165 | 24,3 | 160 | 23,6 | 155 | 22,8 |
| 3500-3999 | 190 | 33,2 | 225 | 35,8 | 270 | 39,5 | 245 | 36,1 | 253 | 37,3 | 237 | 34,8 |
| 4000-4499 | 144 | 25,1 | 141 | 22,4 | 161 | 23,6 | 154 | 22,7 | 142 | 20,9 | 167 | 24,5 |
| 4500-4999 | 23 | 4,0 | 38 | 6,0 | 40 | 5,9 | 46 | 6,8 | 52 | 7,7 | 58 | 8,5 |
| > 5 kg | 5 | 0,9 | 3 | 0,5 | 1 | 0,1 | 6 | 0,9 | 12 | 1,8 | 5 | 0,7 |
| **Tils. omanfyri 2500 g** | **545** | **95,1** | **600** | **95,4** | **662** | **96,9** | **656** | **96,8** | **660** | **97,3** | **667** | **97,9** |
| Ikki upplýst | 10 | 1,7 | 8 | 1,3 | 4 | 0,6 | 4 | 0,6 | 4 | 0,6 | 4 | 0,6 |
| **Tilsamans** | **573** | **100** | **629** | **100** | **683** | **100** | **678** | **100** | **678** | **100** | **681** | **100** |

## 3.23 Børn fødd 2018 – 2023, skift á øki (roknað uppí eru børn, sum eru fødd í Føroyum, men mamman búði uttanlands)

| Ár | 2023 | | 2022 | | 2021 | | 2020 | | 2019 | | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** |
| **Tórshavnarøkið** | 212 | 35,1 | 261 | 41,2 | 260 | 38,1 | 288 | 42,4 | 269 | 39,5 | 269 | 39,6 |
| **Streymoy (Havnin ikki roknað uppí)** | 59 | 10,3 | 45 | 7,1 | 62 | 9,1 | 45 | 6,6 | 69 | 10,1 | 63 | 9,3 |
| **Eysturoy** | 147 | 26,4 | 158 | 24,9 | 159 | 23,3 | 173 | 25,3 | 168 | 24,7 | 155 | 22,8 |
| **Norðoyggjar** | 37 | 6,9 | 74 | 11,7 | 82 | 12,0 | 78 | 11,5 | 72 | 10,6 | 98 | 14,4 |
| **Vágoy** | 62 | 11,0 | 39 | 6,2 | 50 | 7,3 | 33 | 4,9 | 47 | 6,9 | 49 | 7,2 |
| **Sandoy** | 11 | 2,0 | 10 | 1,6 | 14 | 2,0 | 11 | 1,6 | 7 | 1,0 | 9 | 1,3 |
| **Suðuroy** | 40 | 7,4 | 42 | 6,6 | 43 | 6,3 | 42 | 6,2 | 41 | 6,0 | 32 | 4,7 |
| **Bústaður uttan fyri Føroyar** | 6 | 1,0 | 5 | 0,8 | 13 | 1,9 | 10 | 1,5 | 4 | 0,6 | 4 | 0,6 |
| **Ikki upplýst** | 0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 4 | 0,6 | 0 | 0,0 |
| **Tilsamans** | **574** | **100** | **634** | **100** | **683** | **100** | **680** | **100** | **681** | **100** | **679** | **100** |

## 3.24 Vøggudeyði (SIDS) í tiðarskeiðinum frá 1960 til 2023

Í tíðarskeiðinum 1960 – 1991 doyðu tilsamans 14 vøggudeyða (SIDS), t.e. ein deyðatilburður annað-hvørt ár í miðal. Seinastu 33 árini hava bert verið tríggir deyðatilburðir tilsamans av hesum slagi.



LANDSLÆKNIN
STYRELSEN FOR PATIENTSIKKERHED

# 4. Fosturtøkur (abortus provocatus)

Í Føroyum er løgskipan nr. 228 frá 20. juni 1959 um gildiskomu í Føroyum av lóg um atgerðir í sambandi við viðgongu (graviditet) v.m., við seinni broytingum, framvegis í gildi. Sambært hesi løgskipan kann sjúkrahúsyvirlækni, settur á einum av sjúkrahúsunum gera av, um fosturtøka skal fremjast, um so er, at fosturtøkan er neyðug, til tess at byrgja fyri álvarsomum vandum fyri lívi og heilsu hjá kvinnuni, og um so er, at hetta hevur sjúku sum orsøk, og at hetta er staðfest á einum av sjúkrahúsunum, ið lógin fevnir um.

Um so er, at ein kvinna í øðrum førum vil hava fosturtøku, má avgerð um hetta verða tikin eftir samráð millum tann løggilda læknan, ið ger inntrivið, og annan løggildan lækna.

Fosturtøka kann bert verða gjørd á sjúkrahúsum.

Talið á fosturtøkum eftir aldri á kvinnunum hevur seinastu árini verið hetta:

## 4.1 Tal á fosturtøkum í Føroyum 2014 – 2023, eftir aldri á kvinnunum

| Ár/Aldur | <15 | 15-19 | 20-24 | 25-29 | 30-34 | 35-39 | 40-44 | 45-49 | Tal á fosturtøkum tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2023** | 0 | 5 | 6 | 10 | 13 | 7 | 1 | 0 | 42 |
| **2022** | 0 | 2 | 8 | 6 | 4 | 5 | 2 | 0 | 27 |
| **2021** | 0 | 6 | 6 | 6 | 8 | 3 | 4 | 2 | 35 |
| **2020** | 0 | 3 | 12 | 4 | 2 | 4 | 3 | 0 | 28 |
| **2019** | 0 | 2 | 2 | 11 | 4 | 2 | 0 | 0 | 21 |
| **2018** | 0 | 3 | 8 | 4 | 4 | 3 | 3 | 0 | 25 |
| **2017** | 0 | 2 | 4 | 7 | 2 | 2 | 2 | 0 | 19 |
| **2016** | 0 | 3 | 6 | 7 | 3 | 6 | 0 | 1 | 26 |
| **2015** | 0 | 3 | 6 | 3 | 5 | 2 | 2 | 0 | 21 |
| **2014** | 0 | 4 | 6 | 4 | 8 | 4 | 4 | 0 | 30 |

Kelda: Hagstova Føroya

# 5. Stervingar (sterilisatiónir)

Tá ið viðvíkur stervingum, er løgskipan nr. 73 frá 14. mars 1968 um ígildiskomu fyri Føroyar av lóg um sterving og gelding (kastratión) framvegis í gildi. Sambært løgskipanini kan sterving av eini kvinnu verða gjørd uttan loyvi, tá ið viðurskifti bert ella einamest av læknaligum slag gera tað neyðugt at fyribyrgja viðgongu til tess at forða fyri vanda fyri lívi hennara, ella vanda fyri at heilsa hennara fer at versna álvarsliga og varandi. Sterving má í aðrar mátar bert verða framd, eftir at Stervingarnevndin (Sterilisationsnævnet) hevur givið loyvi.

## 5.1 Fundir í Stervingarnevndini (Sterilisatiónsnevndini)

Í 2023 gekk Stervingarnevndin umsóknum á møti frá 112 fólkum. Í 2022 gekk Stervingarnevndin umsóknum á møti frá 80 fólkum. Tvær umsóknir vórðu lagdar til viks, tí upplýsingar vantaðu/ avvístar.

## 5.2 Tølini fyri játtaðar umsóknir

Tølini seinnu árini hava verið hesi:

| Ár | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| **2023** | 81 | 31 | 112 |
| **2022** | 63 | 17 | 80 |
| **2021** | 41 | 23 | 64 |
| **2020** | 57 | 23 | 80 |
| **2019** | 43 | 31 | 74 |
| **2018** | 36 | 23 | 59 |
| **2017** | 38 | 23 | 61 |
| **2016** | 35 | 24 | 59 |
| **2015** | 29 | 35 | 64 |
| **2014** | 25 | 22 | 47 |

Kelda: Henrik Møller, sorinskrivari

# 6. Deyðleiki

## 6.1 Tal á føroyingum, deyðir í 2023 og 2022

Sambært deyðsváttanunum doyðu 406 føroyingar í 2023 (203 menn og 203 kvinnur). Í 2022 doyðu 479 (260 menn og 219 kvinnur).

## 6.2 Pinkubarnadeyði

Sambært uppgerðini hjá Landslæknaembætinum doyðu trý børn undir eitt ár í 2023. Fimm í 2022.

Pinkubarnadeyðin í Føroyum í 2023 (deyð, undir eitt ár pr. 1000 livandifødd) var sostatt 5,2. Í 2022 var pinkubarnadeyðin 7,9.

## 6.3 Deyðfødd

Eitt barn var deyðføtt í 2023 (fimm í 2022).

## 6.4 Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan og frá 65 ára aldri, 2013 – 2023

Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan:




Lowess javngering, 0 ár. Kelda: Hagstova Føroya

Miðal væntað lívsævi frá 65 ára aldri:




Lowess javngering, 65 ár. Kelda: Hagstova Føroya

## 6.5 Lívsævin hjá nýføðingum í Føroyum í miðal fyri árini 2013 – 2023

| Ár | Bæði kyn | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|---|
| **2022/23** | 83,0 | 80,9 | 85,5 |
| **2021/22** | 82,8 | 80,7 | 85,3 |
| **2020/21** | 82,7 | 80,6 | 85,2 |
| **2019/20** | 82,5 | 80,4 | 85,0 |
| **2018/19** | 82,4 | 80,2 | 84,8 |
| **2017/18** | 82,2 | 80,0 | 84,7 |
| **2016/17** | 82,1 | 79,9 | 84,5 |
| **2015/16** | 81,9 | 79,7 | 84,4 |
| **2014/15** | 81,8 | 79,5 | 84,2 |
| **2013/14** | 81,6 | 79,3 | 84,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 6.6 Deyðaatvold hjá føroyingum 2013 – 2022

Á næstu bls. eru at finna talvur yvir deyðaatvold í Føroyum fyri menn og kvinnur við støði í deyðsváttanum viðvíkjandi árunum 2013 til 2022. Føroyingar við føstum bústaði í Føroyum, men deyðir uttanlands, eru tiknir við, men fólk deyð í Føroyum við føstum bústaði í øðrum londum eru ikki við í hesum hagtølum.

Tølini fyri deyðaatvold hjá føroyingum í 2023 verða væntandi tøk við árslok 2024.

**Deyðaatvold hjá monnum í tíðarbilinum 2013 – 2022**

| Kota | Flokking | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A01 | Ígerðarsjúkur íroknað snúltandi sjúkur (parasittar) | 6 | 12 | 7 | 4 | 4 | 2 | 7 | - | 15 | 27 |
| A02 | Krabbamein | 63 | 48 | 53 | 47 | 67 | 63 | 60 | 60 | 53 | 74 |
| A03 | Aðrir svullir (onnur neoplasi) | 2 | 2 | 4 | 2 | 1 | 2 | 1 | 3 | 1 | 3 |
| A04 | Sjúka í blóði og blóðskapandi gøgnum, sum ávirkar immunskipanina | - | 1 | - | - | 1 | - | - | 1 | 1 | - |
| A05 | Endokrinar og føðslutreytaðar sjúkur og stoffskiftissjúkur | 5 | 7 | 10 | 12 | 4 | 4 | 4 | 5 | 7 | 10 |
| A06 | Sálarligar líðingar og atferðarligt órógv | 7 | 9 | 9 | 9 | 15 | 12 | 17 | 10 | 16 | 9 |
| A07 | Sjúka í nervalagnum og sansum | 12 | 10 | 8 | 10 | 12 | 7 | 15 | 10 | 18 | 15 |
| A08 | Hjartasjúkur | 37 | 45 | 43 | 39 | 41 | 42 | 41 | 23 | 40 | 30 |
| A09 | Aðrar blóðrenslusjúkur | 20 | 14 | 21 | 15 | 22 | 12 | 12 | 16 | 16 | 25 |
| A10 | Aðrar sjúkur í andagøgnum | 12 | 17 | 14 | 21 | 17 | 25 | 22 | 18 | 25 | 25 |
| A11 | Sjúkur í sodningargøgnum | 4 | 7 | 5 | 9 | 5 | 11 | 8 | 10 | 3 | 7 |
| A12 | Sjúka í húð og undirhúð | 1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A13 | Sjúka í knoglum, musklum og bindivevnaði | - | - | - | 1 | 2 | 1 | 1 | - | 1 | 1 |
| A14 | Sjúka í vatnræsi og kynsgøgnum | 3 | 4 | 1 | 1 | 6 | 5 | 8 | 4 | 3 | 2 |
| A15 | Tvørleikar í viðgongu og føðing | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A16 | Ávísar sjúkur í smb.v. føðitíðarskeið (perinatalperioden) | - | 2 | - | - | - | - | - | 1 | - | - |
| A17 | Viðføtt vanskapni og kromosombrek | 1 | 1 | 1 | 2 | 2 | 1 | - | 1 | 1 | 3 |
| A18 | Symptomir og óvanligt fund, vánaliga greinaðar orsøkir | 18 | 13 | 8 | 8 | 9 | 1 | 11 | 5 | 2 | 6 |
| A19 | Vanlukkur | 10 | 11 | 7 | 12 | 9 | 9 | 8 | 9 | 6 | 15 |
| A20 | Sjálvmorð og sjálvmorðsroynd | 3 | - | 2 | - | 2 | 3 | 1 | 3 | 2 | 3 |
| A21 | Dráp og álop | 1 | 2 | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A22 | Tilburðir við óvissum umstøðum | 1 | 1 | - | - | - | - | 1 | - | 1 | - |
| A23 | Lógligar uppíleggingar íroknað kríggs-gerðir (politi, hermegi, krígsstøður) | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A24 | Deyðsfall uttan læknafrøðiligar upplýsingar | - | - | - | - | - | - | - | 10 | 9 | 5 |
| AXX | Annað | 2 | 2 | 3 | - | 3 | 9 | - | - | - | - |
| | **Tilsamans** | **208** | **208** | **196** | **192** | **222** | **209** | **217** | **189** | **219** | **260** |

Keldur: Sundhedsstyrelsen og Hagstova Føroya

| **Deyðaatvold hjá kvinnum í tíðarbilinum 2013 – 2022** | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kota** | **Flokking** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
| A01 | Ígerðarsjúkur íroknað snúltandi sjúkur (parasittar) | 6 | 10 | 9 | 1 | - | 3 | 2 | 5 | 13 | 13 |
| A02 | Krabbamein | 34 | 46 | 43 | 55 | 54 | 38 | 42 | 32 | 49 | 64 |
| A03 | Aðrir svullir (onnur neoplasi) | 1 | 3 | 2 | - | 4 | - | - | - | 3 | 3 |
| A04 | Sjúka í blóði og blóðskapandi gøgnum, sum ávirkar immunskipanina | - | 3 | - | 1 | 1 | - | 1 | 1 | - | 3 |
| A05 | Endokrinar og føðslutreytaðar sjúkur og stoffskiftissjúkur | 6 | 2 | 5 | 4 | 4 | 5 | 6 | 1 | 4 | 4 |
| A06 | Sálarligar líðingar og atferðarligt órógv | 11 | 9 | 22 | 15 | 22 | 20 | 15 | 7 | 20 | 13 |
| A07 | Sjúka í nervalagnum og sansum | 7 | 10 | 10 | 12 | 12 | 7 | 9 | 14 | 9 | 13 |
| A08 | Hjartasjúkur | 22 | 32 | 27 | 21 | 24 | 31 | 19 | 19 | 32 | 23 |
| A09 | Aðrar blóðrenslusjúkur | 15 | 14 | 13 | 22 | 22 | 13 | 21 | 17 | 18 | 19 |
| A10 | Aðrar sjúkur í andagøgnum | 21 | 16 | 11 | 16 | 26 | 22 | 21 | 25 | 28 | 31 |
| A11 | Sjúkur í sodningargøgnum | 6 | 5 | 1 | 3 | 4 | 5 | 11 | 10 | 3 | 7 |
| A12 | Sjúka í húð og undirhúð | - | - | - | - | - | 1 | - | - | - | - |
| A13 | Sjúka í knoglum, musklum og bindivevnaði | 2 | - | 1 | 3 | 2 | - | 2 | - | 3 | 2 |
| A14 | Sjúka í vatnræsi og kynsgøgnum | 4 | 4 | - | 3 | 7 | 3 | 12 | 5 | 4 | 4 |
| A15 | Tvørleikar í viðgongu og føðing | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A16 | Ávísar sjúkur í smb.v. føðitíðarskeið (perinatalperioden) | - | - | - | - | 1 | - | 1 | - | 1 | - |
| A17 | Viðføtt vanskapni og kromosombrek | - | - | - | - | 2 | - | - | - | - | - |
| A18 | Symptomir og óvanligt fund, vánaliga greinaðar orsøkir | 22 | 14 | 33 | 9 | 25 | 12 | 16 | 14 | 10 | 10 |
| A19 | Vanlukkur | 1 | 8 | 6 | 8 | 1 | 8 | 7 | 5 | 5 | 7 |
| A20 | Sjálvmorð og sjálvmorðsroynd | - | - | - | 2 | - | - | - | - | - | - |
| A21 | Dráp og álop | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A22 | Tilburðir við óvissum umstøðum | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A23 | Lógligar uppíleggingar íroknað kríggs-gerðir (politi, hermegi, krígsstøður) | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| A24 | Deyðsfall uttan læknafrøðiligar upplýsingar | - | - | - | - | - | - | - | 19 | 3 | 3 |
| AXX | Annað | - | 1 | - | 1 | 2 | 1 | - | - | - | - |
| | **Tilsamans** | **158** | **177** | **183** | **176** | **213** | **169** | **185** | **174** | **205** | **219** |

Keldur: Sundhedsstyrelsen og Hagstova Føroya

# 7. Rættarlæknaligt virksemi

## 7.1 Rættarlæknaligar líkskoðanir

Í 2023 vóru tilsamans 31 rættarlæknaligar líkskoðanir (35 í 2022). Í ávísum førum, verða líkskoðanir, eftir samráð millum løgreglu og landslækna, ikki framdar. Tað er t.d. tá ein deyðfunnin persónur hevur eina sjúkrasøgu og tað er eyðsýnt, hvat viðkomandi er deyður av, ella ein persónur doyr eina tíð eftir eina vanlukku. Í 2023 vóru 19 slík mál (12 í 2022).

## 7.2 Vanlukkutilburðir

Talvan niðanfyri sýnir tann partin av rættarlæknaligu líkskoðanunum, har ið orsøkin til deyðatilburðin er vanlukka. Deyðatilburðir elvdir av vanlukkum við motorakfari standa fyri seg. Tølini síðani 2014 eru hesi:

| Ár | Deyðatilburðir elvdir av vanlukku | Av hesum elvdir av vanlukku við/av motorakfari |
|---|---|---|
| **2023** | 3 | 0 |
| **2022** | 10 | 2 |
| **2021** | 7 | 1 |
| **2020** | 7 | 3 |
| **2019** | 6 | 2 |
| **2018** | 7 | 1 |
| **2017** | 10 | 2 |
| **2016** | 8 | 2 |
| **2015** | 3 | 0 |
| **2014** | 15 | 4 |
| **Tils. 2014 - 2023** | **76** | **17** |

## 7.3 Omandøttur og fall

Eitt fólk doyði av omandøtti/falli í 2023 (einki í 2022).

## 7.4 Drukning

Einki fólk doyði av druknivanlukku í 2023 (trý í 2022).

## 7.5 Kvaling

Tvey fólk doyðu av kvaling í 2023 (tvey í 2022).

## 7.6 Eitran

Eitt fólk doyði av eitran í 2023 (fýra í 2022).

## 7.7 Arbeiðsvannlukkur

Eingin doyði í arbeiðsvanlukku í 2023 (ein í 2022).

## 7.8 Sjálvmorð

Tvey fólk gjørdu sjálvmorð í 2023 (trý í 2022).

Sjálvmorðini hjá fólki við føstum bústaði í Føroyum hava hesi seinastu árini verið:

| Ár | Talið á sjálvmorðum |
|---|---|
| **2023** | 2 |
| **2022** | 3 |
| **2021** | 2 |
| **2020** | 3 |
| **2019** | 1 |
| **2018** | 2 |
| **2017** | 2 |
| **2016** | 2 |
| **2015** | 2 |
| **2014** | 1 |

Sjálvmorð hjá fólki við føstum bústaði í Føroyum, býtt í 5-ára tíðarbil frá 1994 til 2023:

| Ár | Talið á sjálvmorðum |
|---|---|
| **2023-2019** | 11 |
| **2018-2014** | 9 |
| **2013-2009** | 14 |
| **2008-2004** | 12 |
| **2003-1999** | 9 |
| **1998-1994** | 14 |

Samanborið við hini Norðurlondini liggur talið á sjálvmorðum lágt í Føroyum.

Víst verður til frágreiðingina **Prevention of suicide and suicide attempts in the Nordic countries** frá Nordic Council of Ministers 2024, https://pub.norden.org/temanord2024-509/.

## 7.9 Dráp

Einki dráp varð framt í 2023 (einki í 2022). Seinasta árið, ið dráp varð framt, var í 2014.

## 7.10 Náttúrligur deyði

Í 26 førum var deyðshátturin eftir rættarlæknaliga líkskoðan (í summum førum við líkskurði aftaná) skráettur sum nátturligur deyði í 2023 (22 í 2022).

## 7.11 Rættarlæknaligir líkskurðir

Í 2023 vóru framdir sjey rættarlæknaligir líkskurðir (11 í 2022).

## 7.12 Líkpass

Í 2023 varð eitt líkpass skrivað (sjey í 2022).

# 8. Smittandi sjúkur, farsóttir o.a.

Inntil 31. desember 2023 hevði Landslæknin ábyrgd av handfaring, fyribyrgjan og smittusporing av smittandi sjúkum. Fleiri av hesum sjúkum skuldu fráboðast skrivliga, meðan aðrar skuldu fráboðast umvegis telefon til Landslæknan, tí tørvur er á skjótari uppílegging frá mynduleikunum.

Smittandi sjúkur, ið skuldu fráboðast til Landslæknan og Statens Serum Institut eru lýstar í:

- Bekendtgørelse om anmeldelse af smitsomme sygdomme og
- Vejledning om anmeldelse af smitsomme sygdomme

Leinkini lýsa reglar og mannagongdir ísv. fráboðan, men eisini, at allar fráboðanarskyldugar sjúkur, bæði lista 1a sjúkur, (umvegis telefon) og lista 1b sjúkur (skrivligar fráboðanir) skulu fráboðast uttan óneyðugt drál til Landslæknan og Statens Serum Institut.

Eftir 1. januar 2024 skulu allar fráboðanir vendast beinleiðis til Heilsustýrið (www.hst.fo).

## 8.1 Syfilis og gonorré

Síðani 1997 eru fráboðanir um kynsjúkur sendar við oyðiblaði til Epidemiologisku deild á Statens Serum Institut. Statens Serum Institut hevur sagt frá, at seks fráboðanir hava verið um syfilistilburð í Føroyum seinastu 25 árini. Landslæknin hevur lagt merki til, at ikki allar fráboðanarskyldugar sjúkur eru fráboðaðar, bæði tá tað snýr seg um fráboðanir til Statens Serum Institut og til Landslæknan. Eftir nærri kanning fyri árini 2019 til 2021 vísti tað seg, at tað eru nógv fleiri tilburðir av syfilis og gonorré enn fráboðað var. Í tí sambandi sendi Landslæknin bræv til allar læknar um at halda fráboðanarskylduna.

Ein tilburður av syfilis var í 2023 (tríggir í 2022).

Talið á fráboðaðum tilburðum av gonorré í tíðarskeiðnum 2014 - 2023 er víst í talvuni:

| Ár | Gonorrétilburðir |
|---|---|
| **2023** | 7 |
| **2022** | 9 |
| **2021** | 2 |
| **2020** | 2 |
| **2019** | 1 |
| **2018** | 1 |
| **2017** | 2 |
| **2016** | 1 |
| **2015** | 1 |
| **2014** | 0 |

## 8.2 Klamydia

Av tí at talið á positivum kanningum vaks í 2017, sendi Landslæknin enn einaferð í 2019 eitt tíðindabræv um klamydia til fjølmiðlarnar (bløð, útvarp og sjónvarp), har kunnað varð um sjúkuna, viðgerð og fyribyrging.

Tal á kanningum síðani ár 2014 eftir ári og positivum royndum:

| Ár | Tal á kanningum | Positivar | % |
|---|---|---|---|
| **2023** | 1896 | 220 | 11,6 |
| **2022** | 1675 | 178 | 10,6 |
| **2021** | 1945 | 212 | 10,9 |
| **2020** | 1413 | 164 | 11,6 |
| **2019** | 1706 | 215 | 12,6 |
| **2018** | 1820 | 250 | 13,7 |
| **2017** | 1651 | 261 | 15,8 |
| **2016** | 1354 | 156 | 11,5 |
| **2015** | 1289 | 184 | 14,3 |
| **2014** | 1392 | 142 | 10,2 |

## 8.3 HIV og eyðkvæmi (AIDS)

Ein tilburður av eyðkvæmi (AIDS) varð fráboðaður í 2023 (ein útlendingur) (eingin í 2022).

Fyrsti HIV-tilburðurin í Føroyum varð funnin í 1986 hjá tveimum monnum. Í 1987 vóru HIV-tilburðir funnir hjá tveimum monnum og einari kvinnu og í 1988 hjá einum manni. Fyrsti tilburður av eyðkvæmi varð fráboðaður í 1989. Tilsamans fimm menn og tríggjar kvinnur eru deyð av AIDS í Føroyum pr. 31.12.2022.

Síðani 2014 hava tølini á nýfráboðaðum tilburðum verið hesi:

| | Kendir nýggir HIV-tilburðir í Føroyum | | Kendir nýggir AIDS-tilburðir í Føroyum | |
|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **Menn** | **Kvinnur** | **Menn** | **Kvinnur** |
| **2023** | 0 | 0 | 0 | 1 |
| **2022** | 2 | 0 | 0 | 0 |
| **2021** | 1 | 1 | 0 | 0 |
| **2020** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **2019** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **2018** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **2017** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **2016** | 1 | 0 | 1 | 0 |
| **2015** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **2014** | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **I alt** | **4** | **1** | **1** | **1** |

## 8.4 Hepatitis

Í 2023 varð ein tilburður av hepatitis B fráboðaður og tveir tilburðir av hepatitis C (eingin í 2022).

## 8.5 Meningitis

Í 2023 vórðu fýra tilburðir av meningitis fráboðaðir (tveir í 2022). Í árunum frá 1977 til 1990 var ein farsótt í Føroyum við meningokokmeningitis.

## 8.6 Nátasjúka (ornithosis)

Í 2023 varð eingin tilburður av nátasjúku fráboðaður (eingin í 2022).

## 8.7 Kikhosti

Í 2023 vórðu fýra tilburðir av kikhosta fráboðaðir hjá børnum undir tvey ár (eingin í 2022). Ein farsótt av kikhosta var í Føroyum í 2006 við fjúrtan fráboðaðum tilburðum hjá børnum undir 2 ár. Eftir gott og væl 5 ár við ongum kikhosta vórðu í 2012 11 tilburðir fráboðaðir.

## 8.8 Fárasjúka

Í 2023 varð eingin tilburður av fárasjúku fráboðaður (eingin í 2022).

## 8.9 HUS (hæmolytisk-uræmisk syndrom)

Í 2023 varð eingin tilburður av HUS fráboðaður (eingin í 2022).

## 8.10 Legionella

Í 2023 varð eingin tilburður av legionella fráboðaður (eingin í 2022).

## 8.11 Campylobacter

Í 2023 varð eingin tilburður av campylobacter jejuni fráboðaður (ein í 2022).

## 8.12 VTEC/STEC

Í 2023 vórðu 13 tilburðir av VTEC/STEC fráboðaðir (11 í 2022).

## 8.13 Salmonella

Í 2023 varð eingin tilburður við salmonella fráboðaður (ein í 2022).

## 8.14 MRSA

Í 2023 vórðu fýra tilburðir av MRSA-positivum persónum (Meticillin Resistant Stafylococcus Aureus) fráboðaðir (fýra í 2022).

## 8.15 Tuberklar

Eingin tilburður av tuberklum varð fráboðaður í 2023 (ein í 2022). Talið á nýfráboðaðum tilburðum seinnu árini hava verið hesi:

| Ár | Fráboðanir |
|---|---|
| **2023** | 0 |
| **2022** | 1 |
| **2021** | 0 |
| **2020** | 0 |
| **2019** | 1 |
| **2018** | 1 |
| **2017** | 1 |
| **2016** | 2 |
| **2015** | 2 |
| **2014** | 1 |

Í 2023 varð eingin deyðatilburður fráboðaður orsakað av tuberklum (eingin í 2022). Seinasti deyðatilburðurin var í 1992.

## 8.16 Barnakoppsetingarskráin

Landslæknin gav eina frágreiðing um undirtøkuna fyri barnakoppsetingarskránni út í september 2024. Frágreiðingin kann lesast her: https://landslaeknin.stps.dk/útgavur/2024/sep/boernevaccinationsprogrammet-paa-faeroeerne-frem-til-2024

Koppseting er eitt týdningarmikið amboð til at fyribyrgja smittandi sjúkum. Við høgari undirtøku fyri koppsetingarskránni eru børnini vard móti sjúku, samstundis sum onnur, sum t.d. eru ov ung ella veik til at verða koppsett, eru vard. Hetta kallast flokksimmunitetur.

Undirtøkan fyri barnakoppsetingarskránni hevur áður verið høg og støðug í Føroyum. Undirtøkan millum børn, sum eru fødd frá 2014 til 2019, fyri koppsetingunum DiTeKiPol/Hib 3, 5 og 12 mánaðar og PCV 3, 5 og 12 mánaðar hevur verið omanfyri 95%, men síðani er undirtøkan minkað niður undir 95%.

Undirtøkan fyri DiTeKiPol/Hib koppsetingunum sæst í talvunum á næstu síðunum.

Undirtøkan fyri DiTeKiPol/Hib-1 og PCV-1 koppsetingum (3 mánaðar) fyri børn født frá 2010 – 2023:



Undirtøkan fyri DiTeKiPol/Hib-2 og PCV-2 koppsetingum (5 mánaðar) fyri børn fødd frá 2010 – 2022:




Undirtøkan fyri DiTeKiPol/Hib-3 og PCV-3 koppsetingum (12 mánaðar) fyri børn fødd frá 2010 – 2022:



DiTeKiPol verður eisini givið sum ein endurkoppseting (booster) tá børn eru fimm ár. Undirtøkan fyri endurkoppsetingini hevur verið minkandi fyri føðiárgangir yngri enn 2015. Fyri børn fødd í 2015 var undirtøkan 96,5%, meðan undirtøkan fyri børn fødd í 2018 er 65,0%.

Undirtøkan fyri DiTeKiPol endurkoppsetingini (booster) (5 ár) fyri børn fødd frá 2010 – 2018:




Undirtøkan fyri MFR-1 (15 mánaðar) koppsetingini hevur fyri føðiárgangirnar 2015 til 2019 ligið omanfyri 95%, men er minkað til 89,4% og 86,6% í ávikavist 2020 og 2021. Undirtøkan fyri MFR-2 (4 ár) hevur ligið omanfyri 95% fyri føðiárgangirnar 2013 til 2016, men er síðani minkað til 94,7%, 84,1% og 71,3% fyri føðiárgangirnar 2017, 2018 og 2019.

Undirtøkan fyri MFR-1 (15 mánaðir) og MFR-2 (4 ár) koppsetingum fyri børn fødd frá 2010 – 2021:



HPV-koppsetingin verjir ímóti lívmóðurhálskrabba, baktarmskrabba og kynsvørtum. Fyri at HPV-koppsetingin skal vera mest virkin, skulu gevast minst tvey prik, og tilmælið fyri børn undir 15 ár er, at minst fimm mánaðir skulu ganga ímillum tær báðar koppsetingarnar, og bæði prik skulu verða givin innan 13 mánaðir. Tilmælið fyri børn, sum eru 15 ár ella eldri er at geva tríggjar koppsetingar. Koppsetingin er munadyggast, um børnini fáa hana, áðrenn tey eru kynsliga virkin.

Undirtøkan fyri HPV-koppsetingini er minkað ógvusligt: har 95,3% av gentum føddar í 1998 vórðu fult koppsettar (2 sproytur), er hetta bert galdandi fyri 48,8% av gentum sum eru føddar í 2010. Hjá dreingjum var undirtøkan hægst fyri føðiárgang 2008, har 50,5% hava fingið minst tvær koppsetingar. Undirtøkan er síðani minkað, og er síðan fallin til 27,7% fyri føðiárgang 2010.

Undirtøkan fyri HPV-koppsetingini (minst tvey prik) fyri gentur og dreingir, fødd frá 1998 til 2011:




Eftir at frágreiðingin um barnakoppsetingarskránna varð útgivin hevur nógv kjak verið í miðlunum. Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur tí bjóða inn til fund, sum skal kanna, hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at økja um undirtøkuna fyri barnakoppsetingarskránni. Landslæknin er bjóðaður við til fundin.

# 9. Virksemi viðvíkjandi umhvørvi

## 9.1 Kirkjugarðar

Einki mál um kirkjugarðar varð viðgjørt hjá Landslæknanum í 2023 (tvey í 2022).

## 9.2 Mál um at umhvørvisgóðkenna virki

Í 2023 var einki mál um at umhvørvisgóðkenna virki (einki í 2022).

# 10. Eftirlit við heilsuverkinum

## 10.1 Heilsufaklig eftirlit

Landslæknin hevur eftirlit við øllum løggildum heilsustarvsfókið og viðgerðarstøðum í bæði tí almenna og privata heilsuverkinum. Við stakroyndum verða tey ymsu viðgerðarstøðini vald burturúr, sum vit hava eftirlit við. Hetta eru sonevnd planløgd eftirlit.

Eftirlit kunnu eisini verða framd, um Landslæknin fær eitt stúranarskriv frá td. sjúklingum, avvarðandi ella starvsfólki á stovnum, umframt upplýsingar frá øðrum myndugleikum ella í sambandi við líksýn. Ella tá Landslæknin verður kunnaður um ymisk viðurskifti gjøgnum sjúklingafeløg ella miðlar. Tað skal verða talan um eina ítøkiliga stúran um sjúklingatrygdina á tí ávísa viðgerðarstaðnum. Hetta eru sonevnd reaktiv eftirlit.

Fyri øll sløg av viðgerðarstøðum er tað ávís punkt, ið vit hava eftirlit við. Hetta eru sonevnd mátipunkt.

Eftir hvørt eftirlit verður ein eftirlitsfrágreiðing gjørd. Har ber til at síggja, um tað er eitthvørt, sum ikki er í lagi, sum hevur týdning fyri sjúklingatrygdina.

Í juli í 2022 varð "Bekendtgørelse nr. 922 af 16. juni 2022 for Færøerne om registrering af, underretning om og tilsyn med offentlige og private behandlingssteder m.v." sett í gildi í Føroyum. Kunngerðin áleggur øllum viðgerðarstøðum at skráseta seg í einari skrá yvir viðgerðarstøð (https://landslaeknin.stps.dk/eftirlit) og skal Landslæknin hava eftirlit við 8-10% av viðgerðarstøðunum hvørt ár. Í 2024 hevur Landslæknin havt eftirlit við 10% av viðgerðarstøðunum. Byrjað var uppá eftirlitini í november 2022.

Í eftirlitsmálum við stovnum (organisationstilsynssager) er tað leiðslan á staðnum, sum verður biðin um upplýsingar og úttalilsi. Tað er leiðslan á viðgerðarstaðnum, sum hevur ábyrgd av, at arbeiðið verður gjørt á ein hátt, sum er ráðiligur fyri sjúklingatrygdina. Leiðslan skal tryggja fyriskipanarligar karmar, leiðbeining, upplæring og eftirlit, og leypandi fylgja sjúklingatrygdini. Tá vandi er fyri sjúklingatrygdini, kann úrskúrður í eftirlitsmálum við stovnum verða gjørdur eftir §215b í Sundhedsloven. Landslæknin hevur heimild at krevja upplýsingar, ið eru neyðugir fyri eftirlitið.

Í eftirlitsmálum við stovnum eru tað ikki tey einstøku heilsustarvsfólkini, ið Landslæknin metur um, men um sjálvan stovnin. Í heilt serligum førum kann eitt persónsmál, ið snýr seg um eitt ávíst heilsustarvsfólk koma burturúr. Hetta kann henda í samband við eitt eftirlitsmál á einum stovni, um illgruni stingur seg upp, um at eitt - ella fleiri heilsustarvsfólk eru til vanda fyri sjúklingatrygdina. Eitt slíkt mál verður viðgjørt sum ein sjálvstøðugt mál.

### 10.1.1 Skráseting

Til tess at tryggja, at vit eru kunnig við øll viðgerðarstøð, skulu øll almenn og privat viðgerðarstøð skrásetast. Ávís viðgerðarstøð skulu skráseta ein ábyrgdarhavandi lækna/tannlækna. Eisini skulu heilsustarvsfólk á privatum viðgerðarstøðum skrásetast og góðkennast til at kunna veita kosmetiska viðgerð. Møguligt hjálparfók skal eisini skrásetast.

### 10.1.2 Gjald

Øll viðgerðarstøð skulu skráseta seg hjá Landslæknanum. Eitt yvirlit yvir skrásett viðgerðarstøð er tøkt á heimasíðu Landslæknans. Higartil - í september 2024 vóru uml. 250 viðgerðarstøð skrásett. Sambært kunngerðini skulu øll viðgerðarstøð gjalda eitt ómaksgjald, sum skal rinda fyri útreiðslurnar hjá Landslæknanum í samband við eftirlitini. Í 2023 vóru kr. 831.776 innheintaðar í gjøldum frá viðgerðarstøðunum, og samlaðu útreiðslurnar vóru kr. 1.578.307.

### 10.1.3 Eftirlitsfrágreiðingar

Eftirlitsfrágreiðingar eru tøkar á heimasíðuni hjá Landslæknanum ([https://landslaeknin.stps.dk/eftirlit/eftirlitsfragreiðingar](https://landslaeknin.stps.dk/eftirlit/eftirlitsfragreiðingar)). Eftirlitsfrágreiðingar eru almennar í 3 ár. Eftir 3 ár verða tær strikaðar. Frágreiðingar frá sama viðgerðarstaði ella røktareind koma í staðin fyri hvørja aðra, og tí kanst ein bert síggja ta nýggjastu útgávuna. Talið á frágreiðingum er sostatt ikki eitt tekin um, hvussu nógv eftirlit eru framd, og kann tí ikki brúkast til hagfrøðilig endamál.

Í 2022 vórðu bert 4 eftirlit gjørd, tí byrjað varð ikki fyrr enn í november. Í 2023 vórðu 19 eftirlit gjørd, sum fevndu yvir eina kommunulæknaviðtalu (administrativt eftirlit), eitt sjúkrahús (administrativt eftirlit), sjey røktarheim, seks avrúsingar- og bútilboð og fýra eftirlit á kosmetiskum klinikkum.

Í 2024 halda eftirlitini við sambýlum og ellis- og røktarheimum fram, umframt at eftirlit við kommunulæknaviðtalum og bústovnum er byrjað. Ætlanin er at hava 25 eftirlit í 2024.

## 10.2 Eftirlit við heilsustarvsfólki

Í 2023 vóru trý mál viðvíkjandi eftirliti við heilsustarvsfólki (fimm í 2022).

## 10.3 Eftirlit við viðgerðarfyriskipanum

Í 2023 vóru trý mál viðvíkjandi eftirliti við viðgerðarfyriskipanum (ordinationstilsyn) (eitt í 2022).

## 10.4 Førleikaeftirlit

Landslæknin hevur eftirlit við heilsustarvsfólki við misnýtslu ella sjúku, sum kunnu ávirka teirra førleika at starvast sum heilsustarvsfólk. Í 2023 var einki mál viðvíkjandi førleika hjá heilsustarvsfólki (eitt nýtt í 2022).

## 10.5 Mál viðvíkjandi løggildum heilsustarvsfólki við 75 ára aldur

Landslæknin viðgjørdi í 2023 tvey mál viðvíkjandi rættinum hjá løggildum heilsustarvsfólki til sjálvstøðugt virki við 75 ára aldur (trý í 2022).

## 10.6 Sjúkrahússtarvsfólk í 2013 – 2022

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Læknar** | | | | | | | | | | |
| Landssjúkrahúsið | 75,7 | 79,3 | 83,7 | 86,6 | 82,1 | 91,1 | 94,9 | 100,8 | 104,2 | 108,3 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 9,1 | 9,6 | 9,2 | 8,3 | 8,8 | 9,2 | 8,9 | 8,3 | 8,7 | 8,5 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 8,1 | 8,1 | 8,3 | 7,9 | 8,6 | 8,9 | 8,9 | 8,8 | 9,0 | 9,0 |
| **Tilsamans** | **92,9** | **96,9** | **101,1** | **102,8** | **99,5** | **109,2** | **112,7** | **117,9** | **135,3** | **140,4** |
| **Sjúkrarøktarfrøðingar** | | | | | | | | | | |
| Landssjúkrahúsið | 265,4 | 269,5 | 282,1 | 295,6 | 294,2 | 302,6 | 310,6 | 326,9 | 313,5 | 314,1 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 49,2 | 45,2 | 45,3 | 45,5 | 43,3 | 47,0 | 47,3 | 48,3 | 45,0 | 40,6 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 32,2 | 35,7 | 38,0 | 37,4 | | | | | 37,8 | 37,9 |
| **Tilsamans** | **344,6** | **345,6** | **358,9** | **373,9** | **369,7** | **385,3** | **395,8** | **412,7** | **441,1** | **440,7** |
| **Onnur røktarstarvfólk** | | | | | | | | | | |
| Landssjúkrahúsið | 171,2 | 171,3 | 166,9 | 168,2 | 159,9 | 164,4 | 163,8 | 169,1 | 103,4 | 104,6 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 35,1 | 33,8 | 33,2 | 35,3 | 35,6 | 36,5 | 39,4 | 41,7 | 31,5 | 35,3 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 31,9 | 32,1 | 34,3 | 35,7 | 33,5 | 38,5 | 40,2 | 37,2 | 22,2 | 22,5 |
| **Tilsamans** | **238,2** | **237,2** | **234,5** | **239,2** | **229,1** | **239,5** | **243,4** | **248,0** | **179,5** | **186,6** |
| **Onnur heilsufaklig størv** | | | | | | | | | | |
| Landssjúkrahúsið | 222,7 | 214,5 | 219,9 | 229,2 | 232,7 | 236,7 | 239,9 | 243,6 | 292,6 | 301,1 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 34,3 | 31,8 | 30,7 | 32,2 | 32,2 | 32,3 | 31,8 | 33,1 | 45,5 | 44,6 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 29,2 | 28,8 | 29,6 | 32,2 | 28,7 | 30,6 | 31,3 | 32,1 | 40,6 | 40,2 |
| **Tilsamans** | **286,1** | **275,0** | **280,2** | **293,5** | **293,5** | **299,6** | **303,0** | **308,7** | **412,4** | **422,0** |

Kelda: Hagstova Føroya

## 10.7 Sett kommunulæknastørv og tannlæknastørv pr. 31.10.2023

| | Norð-oyggjar | Eysturoy | Norðurstreymoy | Suðurstreymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kommunulæknar** | 3 | 8 | 2 | 13 | 2 | 2 | 4 | 34 |
| **Tannlæknar** | 8 | 10 | 5 | 27 | 5 | 0 | 4 | 51 |
| **Privat tannlæknapraksis** | 4 | 1 | 0 | 20 | 0 | 0 | 1 | 26 |
| **Barnatannlæknar** | 4 | 3 | 0 | 7 | 0 | 0 | 1 | 14 |
| **Privat-/barna-tannlæknar** | 0 | 7 | 5 | 0 | 5 | 0 | 2 | 19 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 10.8 Kærur um løggild heilsustarvsfólk

Í 2023 vórðu 25 nýggj kærumál viðvíkjandi fakliga virkseminum hjá løggildum heilsustarvsfólki. Kærumálini vórðu send til víðari viðgerðar í Styrelsen for Patientklager í Danmark, sum tekur endaliga støðu í málunum.

Talið á kærumálum seinnu árini hevur verið:

| Ár | Tal á kærum |
|---|---|
| **2023** | 25 |
| **2022** | 30 |
| **2021** | 26 |
| **2020** | 17 |
| **2019** | 12 |
| **2018** | 7 |
| **2017** | 10 |
| **2016** | 8 |
| **2015** | 7 |
| **2014** | 21 |

# 11. Apoteksverkið

## 11.1 Apotek, handkeypssølur og starvsfólk

| År | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Apotek | 5,0 | 5,0 |
| Apoteksdeildir | 1,0 | 1,0 |
| Handkeypssølur | 16,0 | 20,0 |
| Farmaceutar | 27,0 | 23,8 |
| Farmakonomar | 52,2 | 54,5 |
| Onnur starvsfólk | 40,7 | 37,7 |
| Næmingar | 20,0 | 14,0 |
| **Tilsamans** | **139,9** | **130,0** |

Keldur: Landsapotekeren og Hagstova Føroya

## 11.2 Skrásetingarnevndin

Í skrásetingarnevndini viðvíkjandi heilivágstilbúnaði eru landsapotekarin, landsdjóralæknin og landslæknin.

## 11.3 Útflýggingarloyvi

Í 2023 gav landslæknin í 62 førum læknum loyvi at flýggja út heilivág, ið ikki er skrásettur, frá apotekunum (62 í 2022).

Hetta virksemið umsitur Lægemiddelstyrelsen í Danmark, men av tí at føroyska heimastýrið hevur yvirtikið apoteksverkið, er danska heilivágslógin ikki galdandi í Føroyum.

# 12. Annað virksemi

## 12.1 Mál viðvíkjandi koyrikorti

Landslæknin er læknafakligi mynduleikin, tá talan er um heilsustøðu viðvíkjandi koyrikorti.

Akstovan biður í hesum sambandi um tilmæli og útsøgn frá Landslæknanum, tá læknin hjá umsøkjara hevur viðmerkt onkra sjúku ella støðu, sum skal metast um, áðrenn umsøkjari kann fáa koyrikort útskrivað ella endurnýggjað.

Í 2023 gjørdi Landslæknin tilmæli í 861 málum viðvíkjandi koyrikortum og 695 í 2022.

## 12.2 Metingar av heilsustøðu

Landslæknin virkar sum ráðgevi hjá føroyskum myndugleikum, tá ið um ræður at meta heilsustøðuna í tænastumannamálum. Í 2023 vórðu tvey mál viðgjørd (trý í 2022).

## 12.3 Gitnaðarmál

Einki mál viðvíkjandi gitnaði varð viðgjørt í 2023 (einki í 2022).

## 12.4 Verjumál

Í 2023 viðgjørdi Landslæknin fýra mál (tvey í 2022).

# 13. Fólkaheilsa

Landslæknaembætið hevur í mong ár – fyrstu ferð í 1980 – lagt dent á týdningin av øktum og samskipaðum virksemi viðvíkjandi heilsuupplýsing, og í 1999 varð eitt lógaruppskot samtykt í løgtinginum um at seta á stovn fyribyrgingarráð.

Í 2008 varð heitið við lóg broytt til Fólkaheilsuráðið.

Eisini verður víst til heilsulýsingar landslæknans fyri Føroyar viðvíkjandi árunum 1999 (bls. 32 og 37) og 2000 (bls. 31).

Í 2023 varð Heilsustýrið stovnað, og virksemi hjá Fólkaheilsuráðnum varð lagt undir nýggja stýrið (www.hst.fo).

Heilsustýrið (fyrrv. Fólkaheilsustýrið) gjørdi á heysti 2023 eina stóra fólkaheilsukanning: ”Hvussu hevur tú tað”. 8000 fólk millum 18-85 ár fingu innbjóðing um at luttaka í kanningini. 5104 (64%) svaraðu spurnarkanningini. Fólkaheilsukanningin ”Hvussu hevur tú tað?” varð eisini gjørd í 2019 og 2015.

## 13.1 Yvirvekt

BMI (Body Mass Index) er ein frymil, sum roknar lutfallið millum hædd og vekt hjá fólki. Liggur BMI-talið á 25 ella hægri, verður tað mett sum yvirvekt.

BMI verður roknað við hesum frymli: BMI = vekt (kg) / hædd (m)$^2$. WHO hevur ásett vektbólkar fyri vaksin soleiðis:

| | |
|---|---|
| **Undirvekt** | BMI < 18,5 |
| **Normalvekt** | 18,5 ≤ BMI < 25,0 |
| **Yvirvekt** | 25,0 ≤ BMI < 30,0 |
| **Stór yvirvekt** | BMI ≥ 30,0 |

Sambært kanningini "Hvussu hevur tú tað?" frá 2023 vigaðu 65,7% av føroyingum millum 18-85 ár ov nógv (BMI ≥ 25) í 2023. 26% høvdu BMI ≥ 30. Tølini fyri 2015, 2019 og 2023 kunnu síggjast í talvuni niðanfyri:




Kelda: Heilsustýrið

Á heimsstigi liggja Føroyar á 4. plássi við talið á fólkum, ið hava eitt BMI á 25 ella hægri, næst eftir Rumenia, USA og Kili:




Keldur: Heilsustýrið og OECD (2024), Overweight or obese population (indicator) (DSD_HEALTH_LVNG@DF_HEALTH_LVNG_BW, data hentet 07.08.2024)

## 13.2 Roykjarar

Niðanfyri eru talvur frá kanningini "Hvussu hevur tú tað?" frá 2023.

Í 2023 royktu 18% av føroyingum hvønn dag. Í 2015 og 2019 vóru tølini ávikavist 19% og 17%.




Kelda: Heilsustýrið

Prosenttalið á føroyingum ið roykja hvønn dag er hægst í Norðurlondum. 18% av føroyingum roykja hvønn dag, meðan í Danmark var talið 12.




Kelda: Heilsustýrið

## 13.3 Rúsdrekka

Rúsdrekkasølan, 100% alkohol litrar til hv. fólk yvir 15 ár og øll frá 2014 til 2023 (tollfrí søla ikki íroknað):




Kelda: Hagstova Føroya

Søla av ymiskum tollfríum rúsdrekka – í litrum pr. fólk - 15 ár og eldri frá 2014 til 2023:




Kelda: Hagstova Føroya

# 14. Aðrar frágreiðingar

## 14.1 Alkohol på Færøerne – forbrug, lovgivning og debat 2023

Víst verður til greinina frá Landslæknanum **Alkohol på Færøerne – forbrug, lovgivning og debat 2023** frá PopNAD, https://nordicwelfare.org/popnad/artiklar/alkohol-pa-faeroerne-forbrug-lovgivning-og-debat-2023/

## 14.2 Forbruget af Ozempic, Wegovy, Rybelsus, Saxenda og Victoza på Færøerne

Landslæknin kannaði í 2024 nýtstluna av Wegovy og Ozempic í Føroyum. Frágreiðingin kann lesast her: https://landslaeknin.stps.dk/útgavur/2024/maj/fragreiðing-um-nytsluna-av-diabetesheilivagi-og-heilivagi-fyri-yvirvekt

LANDSLÆKNIN

STYRELSEN FOR PATIENTSIKKERHED